KSF veksur nógv

Á aðalfundinum hjá Kommunusamskipan Føroya í apríl, fer felagsskapurin at umboða umleið 80 prosent av fólkinum

Randi Jacobsen

Mikukvøldið samtykti stýrið í Vága kommunu einmælt at fara upp í Kommunusamskipan Føroya. Eftir er bara formliga at søkja um limaskap.

Eysturkommuna hevur søkt um limaskap í Kommunusamskipan Føroya.

Tær báðar umsóknirnar verða staðfestar á aðalfundinum í Kommunusamskipan Føroya. Aðalfundurin er settur at verða 5. apríl.

Sum er umboðar Kommunusamskipan Føroya nakað oman fyri 70 prosent av fólkinum. Tá Vága Kommuuna og Eysturkommuna hava fingið limaskap, umboðar Kommunusamskipan Føroya umleið 80 prosent av fólkinum, sigur Eyðun Christiansen, aðalskrivari í KSF.

Hitt felagið hevur vælfleiri limakommunur, men tær flestu kommunurnar eru smáar.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Vága kommunu heldur tað vera rætt av kommuni at velja tann størra kommunufelagsskapin, tí KSF hevur nógv størri fakkunnleika, løgrøðing og annað.

Tá ið hon var forkvinna í Føroya Kommunufelag arbeiddi hon fyri at leggja feløgini saman, men tað arbeiðið kom ikki á mál.



Fá hava gleði av flatskattinum

EITT ÁR VIÐ FLATSKATTI Meira pengar høvdu farið í umfar í samfelagnum, um lág- og miðallønirnir fingu størri skattalætta heldur enn tey væl løntu, heldur Kristina Háfoss, løgtingskvinna fyri Tjóðveldi

Randi Jacobsen

Sosialurin varpaði mánadagin ljós á flatskattin. Niðurstøðan var, at flatskatturin hevur ikki útvegað fleiri fólkum arbeiði, innflutningurin er ikki vaksin, orðini hjá Jørgen Niclasen um, at flatskatturin skuldi eggja fólki at arbeiða meira, gingiu ikki út. Sjónliga ávirkan er bara fleiri uttanlandsferðir og fleiri bilar.

Kristina Háfoss, løgtingskvinna hjá Tjóðveldi er ikki



bilsin av hesi niðurstøðu.

– Tað hevði farið meira peningur til nýtsluvørur, um tað vóru lág- og miðalinntøkurnar, sum fingu størri skattalætta, sigur hon.

Tað verður víst á minkandi arbeiðsloysi, men Kristina Háfoss er sannførd um, at tey tølini skulu setast upp ímóti fráflytingini, sum hevur verið stór. Privata nýtslan er einki vaksin, heldur ikki í krónum hóast prísvøkstur.

Loysir seg fyri hvønn?

Kristina Háfoss tekur í aftur orðini hjá Jørgen Niclasen um, at tað skuldi loysa seg at arbeiða.

– Eg spyrji: Fyri hvønn skal tað loysa seg at arbeiða? Tað kann ikki fyri tey lágløntu, tí tey hava ongan møguleika at koma so høgt upp í inntøkuni, at flatskatturin ger nakran mun.

– Tað kann heldur ikki vera galdandi fyri tey alment løntu, tí tað almenna hevur onga játtan fingið til lønarvøkstur. Arbeiða tey meira, skal yvirtíðin avspákast. Eg haldi, at tey allar flestu fólkini í Føroyum hava onga gleði havt av flatskattinum, sigur Kristina Háfoss.

Skattaskipanin má leggjast um

EITT ÁR VIÐ FLATSKATTI Skulu vit fáa samfelagshjólini at mala betur, mugu lág- og miðalinntøkurnar fáa skattalætta, sigur Aksel V. Johannesen, formaður í Javnaðarflokkinum

Randi Jacobsen

Tað kom ikki óvart á Aksel V. Johannesen, formann í Javnaðarflokkinum, at flatskattaskipanin lítla og onga ávirkan hevur havt.

– Hatta søgdu vit frammanundan, og vit halda tað sama nú. Nýtslan fer ikki upp av hasi skipanini. Nýtslan stendur í stað, sjálvt um stórir skattalættar eru givnir, sigur Aksel V. Johannesen.

Tey við høgum inntøkum brúka lítið meira, tá ið tey fáa skattalætta.

Rætt er tað, at talið av arbeiðsleysum er minkað, og nøkur fleiri eru komin í arbeiði í Føroyum, á virkinum Varðin Pelagic á Tvøroyri og umborð á Norrønu við samstarvsavtaluni millum Arbeiðsloysisskipanina og Smyril Line, vísir hann á.

– Men vit mugu hava í huga, at fráflytingin hevur verið stór, og nógvir handverkarar eru farnir av landinum at arbeiða, sigur Aksel V. Johannesen.

Hann heldur, at skulu samfelagshjólini fáast at mala skjótari, má skattalættin leggjast um, so lág- og miðalinntøkurnar fáa lættan og ikki tær høgu inntøkurnar.

